VIÐMERKINGAR

# Suðuroyarætlanin 1998-2004

**Hergeir Nielsen**



VAL05

Tvær fíggjarlógir eru lagdar við einum halli upp á 1/2 mia.kr., og hildið verður áfram við somu kós við stórum skattalættum til teirra, ið hava ráð at rinda skatt.

Føroya Javnaðarflokkur fór til val uppá, at fólkið skuldi koma fyrst, men hann var skjótur at løggeva fyri, at fólkið skuldi koma síðst.

Fólk flest fagnaðu lítið ítøkiligu Suðuroyarætlanini 2005, men nú hopa samgongumenn undan henni á løgtingsins røðarapalli.

Munurin á okkara Suðuroyarætlan og hesari hjá landsstýrinum eru tær hundraðtals mió. kr., ið fylgdu við og so hesari fjølmiðlaætlanini, har eingir pengar fylgja við.

Upp í saman hava vit greitt frá, hvussu nógvar og hvussu stórar íløgurnar vóru, so tað gera vit ikki í hesum umfari.

Harafturat hava vit roynt fleiri ítøkilig uppskot í farna ári.

Eitt uppskotið var at flyta SL og almenn arbeiðspláss til Suðuroyar. Tað uppskotið skutu teir niður í pomp og prakt.

Annað uppskotið var at brúka nakrar milliónir, ið vóru játtaðar Suðuroynni, til arbeiðsskapandi framtøk í oynni. Tað uppskotið skutu teir eisini niður, og fluttu pengarnar norðureftir.

Landsverk segði tá upp 10-12 monnum. 6-8 av teimum vóru úr Suðuroy.

Triðja ítøkiliga uppskotið var ein **"Menningarætlan fyri Suðuroynna"** á privatum grundarlagi. Og tað uppskotið skutu teir so eisini niður.

Vit fingu ikki so frægt sum fundarboð frá serligu Suðuroyarnevndini, sum var mannað av suðuroyartingmonnum, og sat og høsnaðist í eitt heilt ár uttan nakað ítøkiligt úrslit.

Ótaldar munnligar áheitanir á løgmann, landsstýrismann og tingmenn fóru aftan á skrivligu umsóknini, men so eiðasørt tað munaði nakað sum helst.

Íkastið frá landsstýrinum skuldi bara vera eitt fiskiloyvi til uppisjóvarfisk. Hesum var ikki pláss fyri søgdu teir, samstundis sum veiðiorkan støðugt varð víðkað.

Eitthvørt annað landsstýrið hevði ligið skerflatt fyri einumhvørjum ítøkiligum møguleika fyri at menna Suðuroynna, men soleiðis var ikki í okkara føri.

Vit løgdu ein skúla á Tvøroyri og ein í Vági. Frásæð Jóannesi Eidesgaard undir viðgerðini á tingi hoyrdist ikki pipp nakrastaðni ímóti hesi ætlan.

Kortini hevur formaður javnaðarfloksins nú støðga framtøkum okkara á skúlaøkinum, tí hann sigur seg vilja nakað meir. Hesum hevur hann onga politiska undirtøku fyri.

Samgongumenn hoyrast nú á løgtingsins røðarapalli siga seg ikki standa aftan fyri fjølmiðlaætlan hansara.

So vita vit tað, og so vita vit eisini hvussu ítøkilig pappírsætlan hansara viðvíkjandi ellis- og røktarheiminum er.

Niðurstøðan verður tí ikki onnur enn hon, at Føroya Javnaðarflokkur við sínum kvørkratakið um framburðin í oynni hevur ein stálsettan vilja til, at í Suðuroynni skal also einki henda.

Og so slettis ikki í syðru helvt, har alt Føroya Løgting í fullari semju var farið undir eina 50 mió.kr. stóra verkætlan, sum A-B-C flokkarnir hava skotið niðuraftur.

# www.loysing-fra.dk

VAL05

**Maria Jacobsen**
*valevni Tjóðveldisfloksins*

Sum eitt av valevnum Tjóðveldisfloksins til fólkatingsvalið skal eg í stuttum greiða frá, hví eg sum tjóðveldisfólk ætli mær á fólkating og hvørji mál, eg ætli mær at loysa til frama fyri allar føroyingar og Føroya land:

**Føroyskt fullveldi**
Hóast avgerðin um fullveldi eigur og skal takast í løgtinginum og við fólkaatkvøðu, har allir føroyingar sleppa at siga sína hugsan, haldi eg tað vera rætt og sjálvsagt, at vit eisini á fólkatingi gera vart við krav okkara um fullveldi.

**Føroyar og E.S.**
Ikki er alt ilt við E.S. — verri enn so. Mangt gott kann sigast um E.S., men so leingi E.S. hevur felags fiskivinnupolitikk stýrdan úr Brússel, eri eg ímóti føroyskum limaskapi í E.S., tí hesin felags fiskivinnupolitikkur fer at forkoma okkum sum fiskivinnutjóð.

Eg eri somuleiðis ímóti føroyskum "limaskapi" umvegis Danmark. Við "limaskap" umvegis Danmark hugsi eg um ta ódámligu, sníkjandi gongd hesi seinastu árini, har vit føroyingar uttan limaskap í E.S. alt meira verða viðfarnir sum E.S.-borgarar.

Vit føroyingar verða noyddir at fylgja við í og støðugt laga okkara viðurskifti til umheimin — fyrst og fremst hini Norðurlondini (heruppií ikki minst Danmark), men eisini E.S., U.S.A. og restina av heiminum.

**Fólkatingslógir galdandi í Føroyum.**
Tað truplasta við heimastýrislógini er eftir minum tykki, at vit hava hálvt sjálvstýri, soleiðis at vit føroyingar bæði eru undirgivnir føroyskum løgtingslógum og donskum fólkatingslógum. Hetta ger, at vit mangan "detta niður ímillum tveir stólar" við teimum ólukkuligu av-leiðingum, sum hetta mangan førir til.

Mín áhugi liggur serliga á tí sosialpolitiska økinum, og kann eg sum dømi um slíkar ólukkuligar avleiðingar nevna:

- ruðuleikan við útlendingamálinum, sum alt meira líkist tí í Danmark vælkenda "tamil-málinum", sum fekk álvarsamar avleiðingar fyri løgmálaráðharran og fleiri av embætismonnum hansara.
- ruðuleikan á familjurættarøkinum, har vit bæði kunnu nevna ta í Danmark galdandi fólkatingslógina um skrásett parlag og ta í Danmark galdandi fólkatingslógina um felags foreldramyndugleika, sum danir hava gjørt av skulu praktiserast sum galdandi í Føroyum,
- ruðuleikan á barnaverndarøkinum, har ein smádrongur og systrar hansara fyri hálvum ári síðani duttu niður ímillum ta í Føroyum galdandi fólkatingslógina frá 1960 og ta í Danmark galdandi "servicelógina" frá 1998. Tað tykir mær, at hvørki føroysku myndugleikarnir ella donsku myndugleikarnir hildu seg hava ábyrgdina fyri hesum børnunum,
- ruðuleikan á pensiónsøkinum, har bæði fólkapensiónsupphæddirnar og fyritíðarpensiónsupphæddirnar í Føroyum eru úr 18 % heilt upp í 42 % lægri enn í Danmark — hetta hóast danir í avtaluni frá 20.03.1987 um blokkstuðulsskipanina kravdu, at pensiónsupphæddirnar (eftir skatt) í Føroyum skuldu samsvara við pensiónsupphæddirnar í Danmark,
- ruðuleikan við endurgjaldsábyrgdarlógini og vanlukktryggingarlógini, sum vit enn ikki hava fingið her í Føroyum. Lógaruppskot um hesar lógir hava verið í løgtinginum fleiri ferðir, men eru ferð eftir ferð dottin burtur, tá ið løgtingið fer í summarfrí. Ùrslitið er, at ein føroyingur fær eina nógv lægri endurgjaldsupphædd enn ein dani fær fyri sama skaða.

Vit føroyingar eiga nú at taka avleiðingarnar av hesum ruðuleikum, sum standast av heimastýrisskipanini og taka fult sjálvræði við einans føroyskum løgtingslógum galdandi á øllum økjum fyri okkum føroyingar.

Heitið á yvirskriftini til hesa grein er heitið á frálíku heimasíðu Vága Tjóðveldisfelags á alnótini, har henda grein kann lesast.

# Lat tína atkvøðu fáa veruliga ávirkan

**Kristina Háfoss**
*Fólkatingsvalevni*
*Tjóðveldisfloksins*



VAL05

Ferð eftir ferð fáa vit áminning um, hvussu fáar kvinnur eru við, har politiskar avgerðir verða tiknar - har avgerðir um framtíðina hjá okkum øllum verða tiknar. Men hóast hesar áminningar so broytist hetta ikki. Kvinnur umboða í dag bert 9% á Løgtingi og 0% í Landsstýrinum - hóast vit umboða nærum 50 % av føroyingum. Nú hevur tú møguleika fyri at skapa broyting og gera mun - við at velja eina tjóðveldiskvinnu á Fólkating !

Saman fara TÚ og E at virka fyri:

- At uttanríkispolitisku heimildir Føroya ikki verða fluttar til ES, men heldur heim til Føroya.
- At føroyingar fáa fullan limaskap í Norðurlandaráðnum og øðrum altjóða felagsskapum.
- At gera óhefta búskaparfrágreiðing, ið lýsir búskaparligu støðuna Føroya og Danmarkar ímillum.
- Viðurkenning og virðing av rættindum okkara sum tjóð.
- Framhaldandi at skipa fyri kunnandi ráðstevnum og fundum, til frama fyri betri upplýsing um føroysk viðurskifti í Danmark.
- Virka fyri at menna samstarv við aðrar tjóðir - og senda fleiri føroyskar sendimenn og -kvinnur út í heim.
- Virðiligum og javnbjóðis samstarvi.
- Sum heild at slóða fyri føroyskum sjálvbjargni.

Lat tína atkvøðu fáa veruliga ávirkan.

Vel so tað munar.

**Vel tjóðveldiskvinnu á Fólkating !**

Les meira á heimasíðu míni: www.hafoss.com

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við